

*– Eg haldi meg orka rímuliga væl enn, so eg hugsi ikki um at gevast, sigur Otto*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*– Eg eri farin at hugsa meiri og meiri um at gevast, men tað er ikki bara sum at siga tað, so eg veit ikki, nær tað verður, sigur Sámal*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

*Framhald av forsíðuni*

svarar til og kemur við speiskum viðmerkingum. Eisini er tað ikki frítt, at teir hava hug at trætast um tey ymsu árstølini, men teir koma ásamt um, hvat ár talan er um hvørja ferð. Tí hvørja ferð kemur annar at hugsa um okkurt sum hann blandar við.

Tað var pápi Otto, Sámal í Leirvík, sum lærdi teir tíggju hornblásararnar ventilarnar. Hann spældi við í einum hornorkestri sum var til seinnapartin í tjúgunum.

Fyrstu ferð Klaksvíkar Hornorkestur spældi alment var til jóla í 1950. Og orkestrið var sera aktivt, skipaði fyri ymsum útferðum og eitt samstarv við Havnar Hornorkestur kom í lag rættuliga skjótt. Og fyrstu ferð orkestrini bæði spældu saman alment var á Ólavssøku í 1952. Havnar Hornorkestur kom so norður aftur árið eftir á Norðoyastevnu at spæla.

– Vit spældu Steadfast and True og Sons of the Brave. Tað minnist eg, sigur Sámal. Og so byrja báðir at murra lagið á marsjunum.

Sámal og Otto hava eisini báðir verið dirigentar og formenn í Klaksvíkar hornorkestri. Alt í alt hava tað verið 22 ymiskir dirigentar í Klaksvíkar Hornorkestri hesi 53 árini. Summir í stytri tíðarskeið, aðrir í longri.

Sámal og Otto práta nógv og duga væl at greiða frá. Hvørja ferð ein roynir at spyrja um okkurt, so fylgir ein søga við tí, sum teir greiða frá, og tað ger tað avbera áhugavert at lurta eftir teimum. Og stuttligt eisini, tí nógvar og góðar eru søgurnar um havnamenn og klaksvíkingar í gomlum døgum, sum tó ikki skulu á prent.

Teir báðir eru á einum máli um, at tað er gott og sunt fyri likam og sál at spæla horn. Báðir hava teir spælt kornett tey flestu árini, men tað eina tíðarskeiðið royndi Otto seg sum euphoniumspælara, men hann sigur, at honum dámar betur at spæla kornett. Sámal hevur roynt seg sum piccolospælara eisini. Og báðir hava sum sagt stjórnað orkestrinum og verið formenn. Av tiltøkum sum hornorkestrið hevur tikið stil til kunnu nevnast Grækarismessuhaldið og Flaggdagshaldið um várarnar. (Tað seinna yvirtóku skótarnir eftir eina tíð) og árliga Jólakonsertin í Christianskirkjuni, sum var fyrstu ferð í 1965. Og Sámal og Otto vóru eisini við til at stovna Musikkstevnuna í 1966.

So tað er ikki ov nógv sagt, at teirra lív hevur verið fylt av hornorkestrinum frá ungum árum av, men hvussu longi ætla teir so at halda fram.

Otto sigur, at hann kennir seg ikki troyttan ella nakað enn, so hann heldur, at hann fer at royna at halda fram eina tíð afturat. Men Sámal er meiri afturhaldandi og sigur, at hann hevur hugsað meiri og meiri um at gevast. Men nær tað verður, tað veit hann ikki fyri vist at siga. Báðir eru teir vorðnir heiðurslimir í Klaksvíkar Hornorkestri, og eru teir samdir um, at tá teir gevast at spæla, so merkir tað ikki, at teir fara burturúr.

## EG MEINI TAÐ

# Á fjalli við harpun



*Katrin Petersen skrivar:*

Tú keypir tvey turr tjógv frá einum bónda. Gott kjøt. Góður føroyskur matur. Men nakrar vikur seinni fær tú at vita, at bóndin hevur ein ótespiligan máta at drepa seyð.

Í staðin fyri at skjóta hann við seyðabyrsu og svæva, fer hesin maðurin til fjals við jeppi og harpun. Hann rekur og drepur í senn. Rullar bara rútin niður og skjýtur. Tá fast er í einum lambi, setir hann ferð á jeppin og letur lambið renna so leingi tað orkar, meðan tað bløðir út. Rakar hann væl, so tekur tað sjálvandi ikki langa tíð. Ein minutt ella so. Rakar hann minni væl, so hevur hann kanska bara sprongt vilini, og so ganga kanska fimtan minuttir. Ella tjúgu. Men hann situr í jeppinum, og koyrir aftan á lambinum, til tað ikki longur orkar at renna og dettur niður.

Hvussu væl hevði kjøtið smakkað eftir at tú hevði fingið hesar upplýsingar?

Kanska hevði tað smakkað fínt. Kanska høvdu øll verið fullkomiliga líkaglað. Ið hvussu er tey, sum drønaðu í handlarnar, tá tað fréttist at stórhvalatvøst fekst. "Oys, akkurát sum í gomlum døgum," smíltust fólk og fóru til hús við tjúkkum lunsum av sildrekatvøsti, sum keypmaðurin sjálvur segði VAR ikki so øgiliga dýrt.

Og fjølmiðlar smíltust við, og gjørdu samrøður við fólk sum mintust, hvussu deiligt tað smakkaði, tá tey vóru børn, og mintu okkum á, at skjótt fara vit kanska at skjóta okkara egnu hvalir! Landsstýrið arbeiðir upp á sakina, og so sleppa vit eins og okkara brøðra-"áh-vit-víkingar"-tjóðir at drepa STÓRAR hvalir, og ikki bara liggja og fjasa við grindahvali á sandinum.

Men ongin fjølmiðil upplýsti um, hvussu vit bera okkum at við at drepa størri hvalir. Ongin gjørdi samanberingina "tað tekur 30 sekund at drepa ein grindahval, og kann lættliga taka ein hálvan tíma at drepa ein sildreka".

Stórhvalur verður skotin við eini harpun við innbygdum sprongiknøtti. Rakar skjúttin væl, so ger sprongiknøtturin so stóran skaða á gøgnini, at hvalurin doyr innan fyri nakrar minuttir. Rakar hann ikki heilt væl, so klárar hvalurin at svimja undan í upp móti einum tíma áðrenn hann doyr.

Sjálvandi kunnu vit bara taka eina støðu sum sigur "Forbannað greenpeace-fjas! Ongar kenslur her - vit hava loyvi at drepa djór og eta tey, og tað skulu ongin aktivistar fortelja okkum, hvat vit steikja á pannuni."

Tað er okey. Men so má hetta gjøgnumførast. So má eisini vera í lagi at skjóta seyð, hundar, kaninir og tjøldur við harpun og lata tey renna (ella flúgva) eina løtu til tey doyggja. Tað er jú bara kjøt! Og tað kann ikki vera avgerandi, um aðrir drápshættir finnast. Er tað í lagi at skjóta við harpun, so ER tað í lagi.

Og í sama viðfangi kunnu vit so eisini taka hvalváknið aftur í nýtslu. Tað var jú bannað av samkenslu. Antin okkara egnu ella tí hjá hvalaverndarfelagsskapum. Men harpunera vit eitt hvalaslag, kunnu vit tað sama stinga eitt annað.

Og vit mugu eisini góðtaka, at tað verður enn torførari hjá okkum at argumentera fyri grindadrápi.

Hvussu skulu vit siga? "Nei, vit drepa grindahval snøgt og kvikliga. Tað eru teir størru, vit pína"?!

At fara at veiða stórhval kann heldur ikki sigast at vera ein grundleggjandi partur av okkara mentan, ella eitt týdningarmikið ískoyti til frystiboksina. Vit hava fingið proteinini, vit høvdu brúk fyri, uttan at eta sildreka hesi árini, hann ikki hevur verið til sølu í Føroyum.

Eg veit nú, hvussu dýrt stórhvalatvøst er. Hvussu tað kann matgerast. Og hoyri javnan, hvussu gongst hjá landsstýrinum at greiða gøtuna fyri stórhvalaveiðu.

Men eg veit framvegis onki um, hvørja støðu almennu Føroyar hava til drápshátt. Hvar er markið hjá okkum? Hvussu tryggja vit, at "okkara" hvalir doyggja so skjótt og pínuleyst sum gjørligt? Og hvat gera vit, um tað ikki ber til at drepa teir humant?

Kanska er tað bara støddin, sum er avgerandi. Vit drepa humant og so pínuleyst sum gjørligt - um dýrið afturfyri ikki er tyngri enn fimm mans klára at hála upp á sandin.

**Vikuskifti**

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro





*Mikoyan, Kirov og Stalin í 1932*

## JOSEF STALIN — EITT FIMTI ÁRA MINNI

# SATURN

**5. partur**

MINNI
*Hanus Kamban*

### ANGISTIN SUM GRUNDTÓNI

AFTAN Á at hungursneyðin 1932-33 var av, var sum heild semja í tí sovjetska kommunistaflokkinum um, at eitt óhugnaliga tungt tak var tikið og eitt døkt kapittul endað, men at tað nú leið móti ljósari tíðum — fyri flokkin og landið.

Hetta vísti seg seinni at vera eitt stórt mistak. Tí ikki fyrr enn nú byrjaði tann rætta eldroyndin. Meðan floksins limir og fólkið so smátt fóru at draga andan lættari í vón um, at tey eftir svára líðing høvdu góðan skurð í væntu, vóru fyrireikingar gjørdar til nýggjar atgerðir, so ógvisligar, at tær og teirra avleiðingar bóru av øllum vanlukkum, sum higartil høvdu rakt Russland.

Tann fyrsta atgerðin hevði, sum vit minnast, rakt bóndastættina og Ukraina, tjóð, mál og mentan. Tær nýggju atsóknirnar vóru vendar móti sjálvum flokkinum (t.e. bæði tí gomlu andstøðuni og tí nýggju stalingarduni), móti loyniløgregluni og móti tí Reyða Herinum. Haðani greinaðu tær seg fyrst út til ættfólkini hjá teimum, ið handtikin vóru, og víðari út til at kalla hvørt heim í USSR.

Fáir eygleiðarar mundu í 30´árunum skilja, hvat veruliga fór fram í USSR. Í dag ber til at skilgreina, bæði hvat ið fór fram, og hví tað fór fram. Tí hendingarnar — ið bæði skuldu skapa eitt nýtt slag av valdi og umboða ein radikalitet í miðlunum til at vinna og umsita hetta vald, sum fáur tá dugdi at ímynda sær - høvdu sína serligu skilvísu frágreiðing.

Endamálið var at byggja upp eina tronga, monolittiska valdsskipan. Ikki longur flokkurin, heldur ikki onkur vongur ella bólkur í flokkinum, men bara ein maður — við einum liði av undirbrotligum, andlitsleysum klæðsekksdreingjum rundan um seg - skuldi eftir hetta ráða í USSR. Málið var í øðrum lagi, at ikki bara einhvør verulig ella møgulig andstøða — í flokkinum ella øðrum valdsdeplum — men eisini ein og hvør hýpotetisk mótstøða skuldi beinast burtur.

Málið var í triðja lagi at skapa eitt samfelag, har angistin var grundtóni, límið, ið bant samfelagsins foyrur saman, tann megi, ið fekk borgaran at akta og lata sær lynda treytaleyst. Sum irakiski rithøvundurin Kanan Makiya hevur gjørt greitt í bók síni Republic of Fear, er nútíðar Irak (sum tykist at fara í søguna, meðan hesar reglur verða skrivaðar) myndað eftir hesum leisti.

### FÓLKSINS FÍGGINDAR

HVAT VALDSMIÐLANNA radikaliteti viðvíkir, so var endamálið at berja eina og hvørja — veruliga ella hýpotetiska — andstøðu so ruddiliga niður, at hon ongantíð vísti seg aftur.

Evsti miðil til at gera hetta var deyðin. At skjóta fólk hevði verið vanligt síðan 1917. Men higartil hevði eingin vágað at brúkt henda atburð móti limum í flokkinum. Flokslimir vóru brøður og systrar, her var tí ein forðing, eitt rituelt "blóðmark", sum darvaði. Stalin hevði fleiri ferðir hálvbrokkast um at fara yvir um hetta markið, men sjálvt harðførir stalinistar sum Kirov ella Ordsjonikidze vildu ikki eftirlíka honum í hesum.

Vit koma nú til tað kanska mest týðandi eyðkennið fyri ta nýggja USSR. Sum nevnt fyrr hevði sovjetski kommunistaflokkurin ongan fólkaræðisligan legalitet, onga rót í atkvøðutali ella fólkavilja. Eina slíka akkersfestu hevði Stalin uppaftur minni. Tað ráddi tí um onkursvegna at loypa bukk um veruleikan og skapa eina mekanismu, sum kundi koma í legalitetsins stað.

Her fekk propagandan avgerandi týdning. Brúk var fyri fíggindamyndum. Tí varð ein nýggj demonologi fyrireikað og bygd upp, sum bæði skuldi gera fólk bangin og geva atgerðum og atsóknum móti "fólksins fíggindum" ein dám av rationaliteti.

### RJUTIN OG KIROV

TVÆR ATVOLDIR kunnu hava sett ferð á arbeiðið at byggja upp eitt nýtt, monolittiskt ræðustýri. Onnur hevði samband við tann sokallaða Rjutin-pallin. Martemjan Rjutin, sum var av bóndaætt og eitt skifti hevði verið skúlalærari, var virkin limur í sovjetska kommunistaflokkinum og hevði í 20´unum verið millum teirra, ið funnust at andstøðuni, m.a. eisini at Trotskij. Men Rjutin var maður, ið hugsaði sjálvstøðugt, og tá ið bóndastættin varð týnd og bygdirnar í Ukraina oyðilagdar, vildi hann ikki tiga longur. Hann varð tí koyrdur úr flokkinum.

Rjutin skipaði nú — í 1932 - saman við nøkrum øðrum ónøgdum marxistum fyri einum nýggjum politiskum andstøðubólki. Fundir vórðu hildnir, og í greinum gjørdi Rjutin-bólkurin vart við, at landið bleiv múlabundið, at valdsmisnýtsla fór fram, at bygdasamfelagið var gjørt til eina oyðimørk, og at list og bókmentir vórðu kryplaðar til at vera skorður hjá stalinleiðsluni. Limirnir í bólkinum vórðu handtiknir tann 15. september 1932. Rjutin varð seinni píndur og skotin. Ein kann í dag ikki annað enn undrast á hansara ófatiliga reystleika.

Hin hendingin fór fram á tí 17. Flokstinginum, tá ið tann nýggja aðalnevndin varð vald. Við tað at bara ein limur var uppstillaður til hvønn sess í nevndini, og hvørt valevni, sum fekk meira enn 50% av atkvøðunum, varð valt, var úrslitið at kalla gjørt av frammanundan. Men atkvøðugreiðslan var loynilig, og sostatt kundi altíð okkurt óvæntað koma fyri.

Og tað óvæntaða hendi. Tá ið talt varð, vísti tað seg, at tær flestu mótatkvøðurnar fóru til Molotov, Kaganovitj og Stalin. Sambært summum vitnum fekk Stalin 292 mótatkvøður, sambært øðrum 270. Hansara sessur var ikki í vanda, men fyri hansara umdømi — menn runnu nú á leistum rundan um henda nýggja hálvgudin - var hetta ein smeitur. Úrslitið bleiv sjálvsagt dult sum mans morð, og kunngjørt varð, at 3 atkvøður vóru ímóti Stalin og fýra móti Kirov.

Hesi viðurskiftir prógvaðu sjálvandi til fulnar, at Stalin ikki enn hevði fingið fastatøkur á sínum flokki. Ikki bara andi enn ein leivd av andstøðu í flokkinum, Stalin hevði fingið ein nýggjan kappingarneyta. Sergei Kirov, føddur í 1886, fyrrverandi russiskur sendimaður í Georgia, limur í Politbýronum frá 1930 og floksskrivari í Leningrad, hevði fleiri ferðir fingið áheitanir um at lata seg stilla upp til starvið sum aðalskrivari. Kirov var dugnaligur og nógv betur umtóktur í flokkinum enn Stalin.

*Framhald á síðu 10*